# Tipping og fótbóltur 2000

*Í dag kemur fótbóltur 2000 í handlarnar kring landið, og í hesum sambandi fara John Petersen og Magni Jarnskor at tippa uppi í Horninum*



JÁKUP MØRK

Í dag kemur fótbóltur 2000, sum er eitt serblað um komandi landskappingina, í sølubúðirnar kring landið.

Samstundis, sum hetta verður gjørt, fer Sosialurin saman við Horninum í SMS undir eitt nýtt tiltak, har kendir føroyskir fótbóltsleikarar fara at tippa enskan fótbólt.

Tippingin verður skipað soleiðis, at liðformenninir úr teimum fýra feløgunum, sum endaðu ovast á stigatalvuni í fjør, upp á skift fara at siga sína hugsan um dystirnar. Talan er sostatt um teir fýra, Jan Joensen úr KÍ, Magna Jarnskor úr GÍ, John Petersen úr B36 og Rúna Nolsøe úr HB, sum vera við í hesum teiginum.

### Í Horninum í dag

Skjøtul verður settur á tippingina í dag, og verður hetta gjørt samstundis sum Fótbóltur 2000 verður til keyps í sølubúðunum kring landið.

Fyri at gera eitt sindur eyka burturúr, verða tveir av omanfyrinevndu leikarum uppi í Horninum í dag kl. 17.00, og eru hesir Magni Jarnskor og John Petersen.

### Vinningurin latin víðari

Tippað verður annars fram til enska landskappingin er lokin, og verður samlaði vinningurin hjá teimum fýra (sum vónandi verður stórur), tá latin til vælgerandi endamál.

# United og Bayern aftur í eldin

*Í kvøld vera báðar tær seinnu fjórðingsfinalurnar spældar í Champions League*

HEINI Í SKORINI

Í kvøld vera báðar tær seinnu hálvfinalurnar í Champions League leiktar. Týskvøldið leiktu Barcelona og Chelsea, har Barca skuldi royna at venda einum 3-1 tapi, og Lazio og Valencia møttust eisini í Róm, har fyrri dysturin endaði ikki minni enn 5-2 til Valencia, men blaðið var farið til prentingar, tá hesir dystir vóru avgreiddir.

### Porto skal hava mál

Í kvøld tekur Manchester United so ímóti Real Madrid, meðan Bayern München fær vitjan av Porto. Fyrri dysturin millum Bayern og Porto endaði 1-1, og hóast alt kann henda, er Bayern favorittur at spæla seg til hálvfinaluna, tí Porto skal í minsta lagi hava eitt mál, um teir skulu koma víðari. Tað vil so siga, at Porto skal fram á vøllin og skapa nakað, og tað kann jú geva Bayern bæði pláss og málmøguleikar í hinum endanum. Porto spælir tó sera sterkan álopsspfótbólt, og fáa teir eitt mál, er alt aftur opið. Dysturin í kvøld verður eisini sermerktur av brasilianskum álopsspælið, tí álopið hjá Bayern verður nevniliga mannað av tveimum vandamiklum brasilianarum, Paulo Sergio og Giovane Elber. Í hinum endanum fer Mario Jardel, sum eisini er brasilianari, uttan iva at seta sín dám á spælið, og hetta fer vónandi at geva ein spennandi og málríkan dyst.

### Eyguni vend móti Old Trafford

Men flestu eyguni vera uttan iva vend móti Old Trafford, har Champions League vinnararnir frá í fjør, Manchester United, taka ímóti kongaliga høvuðsstaðarliðnum Real Madrid. United er í sera góðum formi í løtuni, har teir m.a. vunnu 4-0 í vikuskiftinum á Sunderland, og seinasta vikuskiftið sorlaðu teir West Ham sundur við einum sannførandi 7-1 sigri. Real Madrid er eisini væl koyrandi í løtuni, hóast teir ikki hava spælt líka sannførandi sum United. Í heimligu kappinginum vunnu teir í vikuskiftinum 1-0 móti einum øðrum toppliði, Real Zaragoza, og seinasta vikuskiftið vunnu teir eisini 1-0, tá var mótstøðuliðið Celta Vigo.

Fyrri dystur teirra millum endaði 0-0, men Real Madrid hevði yvirvág í spælinum og betri møguleikar, hóast United eisini hevði møguleikar at leggja seg framum.

Í tí dystinum var United málverjin Mark Bosnich dagsins maður, meðan verjuleikarin Jaap Stam eisini spældi ein ótrúliga góðan dyst, har hann fleiri ferðir steðgaði Morientes, Raul og co. í síðstu løtu. Í álopspartinum hjá United var Andy Cole ein reglulig hóttan, og spaniólarnir máttu eisini allatíðina hava eyguni við vandamikla Dwight Yorke.

Skal ein favorittur í kvøld útnevnast, má tað helst vera Manchester United, av tí at teir hava heimavøll, men alt í alt tveir sera spennandi dystir millum Bayern München- Porto, og Manchester United-Real Madrid.

# Liktinstein hevur sjey útisetar

***Fótbóltslandsliðið:**Men mótstøðuliðið hjá føroyska landsliðnum komandi mikukvøld verður ikki mannað við spælarum, sum dagliga spæla á serliga høgum støði*



*Einasta ivamálið á føroyska landsliðnum er í løtuni, hvørt Óli Johannesen verður til reiðar at spæla*

Týsdagin lættir føroyska landsliðið úr Vágum. Málið er Liktinstein, har altjóða skrásettur landsdystur verður mikukvøldið. Fyri einari góðari viku síðani høvdu vit nøvnini á teimum átjan spælarunum, sum Allan Simonsen hevur sent boð eftir, í blaðnum. Talan er um tíggju spælarar, sum fáa løn fyri at spæla fótbólt uttanfyri landoddarnar og átta, sum eru við í heimligu kappingini.

Í gjár varð upplýst á skrivstovuni hjá Fótbóltssambandinum, at eingin spælari hevði givið avboð. Tað hevur annars verið eitt sindur ivasamt, hvussu tað fór at vera við Óla Johannesen, sum fekk ein løst undir venjing í síðstu viku, men í gjár hevði Óli ikki givið avboð.

Um allir teir átjan, sum eru úttiknir, kunnu fara niður til Liktinstein í komandi viku, verður ikki greitt fyrrenn dagin undan fráferðini. Spælararnir í heimligu kappingini skulu spæla tríggjar dystir, áðrenn teir fara avstað. Teir skulu spæla í steypakappingini í morgin og leygardagin, og so skulu teir spæla í landskappingini 2. páskadag. Ein av heimligu landsliðsmonnunum, Rógvi Jacobsen í KÍ, skuldi har afturat spæla í steypakappingini í gjárkvøldið.

Donsku útisetarnir skulu spæla í superliguni bæði skírisdag og 2. páskadag, og í Noregi verður fyrsta umfarið í næstbestu deildini spælt 2. páskadag.

### Ikki nógvar royndir

Venjarin hjá Liktinstein eitur Ralf Loose. Hann hevur kunngjørt nøvnini á teimum átjan spælarunum, sum komandi mikukvøld skulu vera við í landsdystinum móti Føroyum.

Sambært yvirlitinum eru sjey spælarar skrásettir í feløgum uttanfyri Liktinstein. Okkum kunnugt spæla hesir sjey millum lítið og einki í bestu deildunum í Sveis og Eysturríki. Undantakið er álopsmaðurin Mario Frick, sum umboðar sveisiska felagið FC Zürich. Tað er bara í hesum báðum grannalondum hjá Liktinstein, at landsliðsspælarar hjá Liktinstein, sum ikki spæla í heimligu kappingini, eru at finna.

Eitt av eyðkennunum fyri landsliðið hjá Liktinstein er, at spælararnir hava ikki spælt serliga nógvar landsdystir. Í hvussu so er ikki um sammett verður við føroysku spælararnar.

Í føroyska ferðalagnum hava tveir triðingar av spælarunum verið fleiri enn tjúgu ferðir í altjóða skrásettum landsdystum. Av teimum átjan spælarunum, sum hesa ferð eru valdir at umboða Liktinstein, eru tað bara fimm, sum hava spælt fleiri enn tjúgu landsdystir.

Helmingurin av teimum átjan føroysku spælarunum hava spælt fleiri enn tredivu landsdystir. Bara ein av spælarunum hjá Liktinstein hevur spælt fleiri enn tredivu landsdystir. Tað er tann 25 ára gamli verjuspælarin Daniel Hasler, sum saman við fimm liðfeløgum umboðar FC Vaduz. Daniel hevur spælt 31 landsdystir, og hann hevur skorað eitt landsliðsmál.

### Finna sjáldan meskarnar

Merkisvert er tað, men tað er ikki óvæntað, at teir átjan spælararnir úr Liktinstein tilsaman bara hava skorað fimm landsliðsmál. Liktinstein skorar ikki mál í hvørjum dysti, og teir plaga heldur ikki at skora mál á hvørjum ári. Hesin veruleikin fer ivaleyst at bera við sær, at mótstøðumenninir hjá føroyska liðnum komandi mikukvøld fara at vera sera grammir, tí tað er ikki á hvørjum sinni, at teir hava eitt mótstøðulið, sum er styrkismett so tætt at teirra liði.

Átjan manna hópurin hjá Liktinstein sær soleiðis út: Málverjar: Peter Jehle, FC Schaan, og Martin Oehry, FC Rankweil Eysturríki.

Verjuspælarar: Fréderic Gigon, Lausanne Sveis, Daniel Hasler, FC Vaduz, Patrik Hefti, FC Vaduz, Jürgen Ospelt, FC Vaduz, Christof Ritter, FC Winterthur Sveis og Harry Zech, FC Balzers.

Miðvallarar: Herbert Bicker, FC Schaan, Ronny Büchel, FC Vaduz, Patrick Burgmeier, USV Eschen–Mauren, Martin Stocklasa, FC Zürich Sveis, Michael Stocklasa, FC Vaduz, Martin Telser, FC Vaduz og Albert Wohlwend, FC Roschach Eysturríki.

Álopsspælarar: Matthias Beck, FC St. Gallen Sveis, Thomas Beck, FC Vaduz og Mario Frick, FC Zürich Sveis.

JH



# Ólavur bjóðar av í toppinum

***FM í talvi:** Teir báðir, sum vóru á odda eftir trý umfør, skulu hittast í síðsta umfarinum*



*Flóvin Tór Næs er í løtuni á triðja plássi í landsliðsbólkinum, men í dag hevur hann møguleikan at taka seg fram um Ólav Simonsen*

Allir teir tíggju, sum sita í Eydnuni á Oyrabakka og telva um FM heitið fyri einstaklingar, vóru mánakvøldið komnir á stigatalvuna. Tá vóru trý umfør løgd afturum.

Við øðrum orðum kunnu vit siga, at triðingurin av kappingini var farin, tá teir fyrrapartin í gjár settust aftur við borðini. Níggjunda og síðsta umfarið er á skránni leygardagin.

### Stóri týsdagurin

Tá teir yviri í USA skulu finna fram til, hvør skal umboða republikanska og demokratiska flokkin á forsetavalinum, plaga teir at tosa um super tuesday. Hetta gera teir, tí tað ein ávísan týsdag í mars mánaði verður avgjørt í fimtan av teimum  hálvt hudrað statunum, hvør skal verða forsetavalevni.

Hetta hugtakið, super tuesdag, tosaðu teir nógv um á Oyrabakka í fyrrakvøldið og í gjár. Orsøkin var tann, at í gjár vóru tvey umfør á skránni í meistarabólkinum. Tað fyrra av teimum báðum umførunum roknaðu teir við fór at verða liðugt klokkan trý seinnapartin, og so skuldi seinna umfarið telvast seinni á degnum.

Tá hesi bæði umførini vóru liðug seint í gjárkvøldið var kappingin meiri enn hálvrunnin. Støðan, sum vit hava í blaðnum í dag, er gjørd upp, áðrenn teir norðuri á Oyrabakka vóru lidnir við ta fyrra av teimum báðum umførunum, sum vóru á skránni í gjár, og tí sigur tað seg sjálv, at møguleiki er fyri stórum broytingum, áðrenn hetta blaðið er komið haldarunum í hendi. Men tað venda vit aftur til í morgin.

Í tí fyrra umfarinum í gjár vóru kanska mest áhugaverda talvið tað millum John Rødgaad, sum við tí hvíta fólkinum telvaði móti Thorbirni Thomsen, og tað har Flóvin Þór Næs hevði svarta fólkið móti Herlufi Hansen.

### Vápnahvíld

Av Oyrabakka frætta vit, at annað umfarið, sum var á skránni sunnudagin, og sum vit umrøddu í blaðnum í gjár, var heilt blóðugt, um tað ber til at siga tað soleiðis. Mesta tosið snúði seg um sigurin hjá John Rødgaard á Heina Olsen, og tað var serliga orginali Fxc7 leikurin, sum varð nógv umrøddur.

Hesar reglurnar eru skrivaðar fyri at tey, sum eru áhugað, men sum ikki út í æsir fylgja við, kunnu hava eina hilling á, hvussu tað gongur í FM kappingini. Hvat hesin serliga orginali Fxc7 leikurin akkurát hevði við sær, og nær hann kom fyri í talvinum ber til at síggja á heimasíðuni hjá Talvsambandinum. Hon finst á www.sam-teld.fo/talv.

Eftir blóðuga annað umfarið sunnudagin, tá einki talvið endaði remis, var tað so at siga vápnahvíld í triðja umfarinum mánadagin. Trý talv endaðu javnt. Størsti áhugin var fyri talvinum millum Flóvin Þór Næs og John Rødgaard. Flóvin legði fyri við at flyta riddaran á f3, og eftir 24 leikir samdust teir um javnt.

Heini Olsen, sum datt eitt sindur burtur ímillum í oddastríðnum, tá hann tapti fyri John Rødgaard í øðrum umfari, mundi tevja møguleikan fyri at lyfta seg uppaftur við sigri, tá hinir báðir frammanfyri nevndu samdust um javnt. Heini stríddist leingi fyri at vinna móti Torbirni Thomsen, men eftir at hann hevði mist eina finnu, snúði stríðið hjá Heina seg meiri um at fáa javnt. Teir samdust um eitt hálvt stig í part eftir 51 leikir.

Styttsta talvið var millum teir báðar Herluf Hansen og Carl Eli Nolsøe Samuelsen, sum í vetur hava telvað fyri føroyameistararnar úr Havnar Telvingarfelag. Eftir tíggju leikir samdust teir um remis. At teir gjørdu so skjótt av hevði við sær, at teir fingu nakrar tímar meiri enn hinir at hvíla og fyrireika seg til strævna týsdagin í.

### Brøðrastríðið

Einastu vinnararnir í triðja umfarinum vóru Eyðun Nolsøe, sum vann á eldra bróðrinum Rana. Eyðun var tann síðsti av teimum tíggju í meistarabólkinum, sum kom á stigatalvuna. Brøðurnir báðir kenna sjálvsagt hvønn annan serliga væl, og teir hava mangan sitið yvir talvborðinum og analyserað, tosað og diskuterað og kanska ikki altíð verið samdur um, hví hesin leikurin júst var tann rætti, ella hví ein annar hevði verið betri.

Tá Eyðun mánadagin setti seg við hvíta fólkinum, hevði hann styrkistalið 2170. Rani Nolsøe hevði styrkistalið 2195.

Talvið gjørdist drúgvt. Fyrsti leikurin hjá Eyðuni var e4, Rani svaraði aftur við d6, Eyðun flutti d finnuna undir liðina av e finnuni, og so kom svarti riddarin fram á f6 og hvíti riddarin fram á c3. Tá Eyðun hevði flutt sín 56. leik, legði Rani kongin.

Sum sagt, so ber til at fylgja talvunum á heimasíðuni hjá Talvsambandinum.

### Nýggjur avbjóðari

Í blaðnum í gjár og eisini í umrøðuni omanfyri hevur mesti áhugin fyri toppstríðnum snúð seg um John Rødgaard og Flóvin Þór Næs, og eitt sindur hevur eisini verið gjørt burturúr, at Heini Olsen, FM vinnarin í fjør, ikki rættuliga er komin fyri seg. Merkisvert er tað, at eftir trý umfør hevði Heini einki talvið vunnið og harvið var hálvt annað stig aftanfyri teir fremstu.

Meðan eyguni hava verið snarað móti hesum trimum, so hevur ein annar smoygt seg fram millum teir fremstu. Talan er um Ólavur Simonsen úr Klaksvíkar Talvfelag. Hann hevur í fleiri ár verið mettur at vera millum teir mest evnaríku ungu telvararnar, og á Oyrabakka mettu teir í gjár, at tað er ikki óhugsandi, at Ólavur fer at vera heilt drúgvur hesa ferð. Eftir hálva stigið móti Heina Olsen í fyrsta umfarinum vann Ólavur bæði móti Torbirni Thomsen og Martin Brekká.

Í gjár vóru mótstøðumenninir hjá Ólavi Rani Nolsøe og so Carl Eli Nolsøe Samuelsen. Í dag er mótstøðumaðurin Flóvin Þór Næs. Bæði John Rødgaard og Heini Olsen hava áður verið meistarar. Um ein nýggjur meistari skal finnast hesa ferð, so verður tað Flóvin ella Ólavur. Tí er talvið teirra millum í dag rættuliga spennandi og avgerandi.

Skráin er løgd soleiðis, at í níggjunda og síðsta umfarinum, sum er á skránni leygardagin, skal Ólavur Simonsen við hvíta fólkinum telva móti John Rødgaard.

JH

**Støðan í landsliðsbólinum eftir trý umfør**

| | | |
|---|---|---|
| John Rødgaard | 2 1/2 | stig |
| Ólavur Simonsen | 2 1/2 | stig |
| Flóvin Þór Næs | 2 | stig |
| Herluf Hansen | 1 1/2 | stig |
| Torbjørn Thomsen | 1 1/2 | stig |
| Heini Olsen | 1 | stig |
| Eyðun Nolsøe | 1 | stig |
| Carl E.N. Samuelsen | 1 | stig |
| Martin Brekká | 1 | stig |
| Rani Nolsøe | 1 | stig |

Í sætta umfarinum, sum er á skránni í dag, verður telvað soleiðis:
Flóvin Þór Næs–Ólavur Simonsen
Herluf Hansen–Eyðun Nolsøe
Carl Eli Nolsøe Samuelsen–Heini Olsen
Rani Nolsøe–Torbjørn Thomsen
John Rødgaard–Martin Brekká

# Martin og Jákup á odda

*Í almenna bólkinum hava Martin Poulsen og Jákup F. Joensen lagt seg á odda. Báðir hava teir fult stigatal*

Tveir telvarar høvdu vunnið øll talvini, tá trý umfør vóru løgd afturum í almenna bólkinum. Har eru 21 luttakarar – Bjørn Thomsen, sum tapti fyrsta talvið, hevur tikið seg burturúr kappingini.

Teir báðir, sum eingin hevði skalað fyrstu dagarnar, eru blaðungi Martin Poulsen úr Havnar Telvingarfelag og ein av veteranunum, Jákup F. Joensen, úr Gøtu. Hesir báðir vóru klárt á odda, tí eingin av hinum nítjan telvarunum høvdu fleiri enn tvey stig.

Í almenna bólkinum telva teir átta umfør.

### Rúni einsamallur

Bara ein av teimum fjúrtan telvarunum í unglinga bólkinum hevði fult stigatal, tá trý umfør vóru løgd afturum.

Talan er um Rúna Dragaberg úr Klaksvíkar Talvfelag. Tá tað á páskum í fjør varð telvað um FM í Klaksvík, var Rúni Dragaberg leingi á odda, men hann snávaði í síðsta umfarinum.

Hvussu tað fer at hilnast hesa ferð fekst ivaleyst ein góð ábending um í gjár. Tá telvaði Rúni við hvíta fólkinum móti Karl M. S. Jensen úr Róki, sum var annar av teimum, ið høvdu tvey og eitt hálvt stig. Hin var Mannbjørn Anthoniussen úr Klaksvík.

Tað eru 14 luttakarar í unglinga kappingini.

JH